# ÁRSFRÁSØGN 2004






NORÐOYA SPARIKASSI

# ÁRSFRÁSØGN 2004

# UM SPARIKASSAN

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-700 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
www.ns.fo
ns@ns.fo

**Sparikassin**

er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaognn ella avlopi sparikassans.

**Avlop sparikassans**

verður – burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

**Í sparikassanum**

eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

## Innihaldsyvirlit

| | |
|---|---|
| Um sparikassan | 3 |
| Lykla- og høvuðstøl | 7 |
| Til ábyrgdarar og viðskiftafólk | 8 |
| Árið, ið fór | 10 |
| Ársfrágreiðing | 30 |
| Átekningar til ársfrásøgnina | 33 |
| Rakstrarroknskapur | 34 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 35 |
| Kapitalflytingar og solvensuppgerð | 36 |
| Peningastreymsroknskapur | 37 |
| Viðmerkingar | 38 |
| Nýttur roknskaparháttur | 44 |

## Deildir

Leirvík
Tel. 475100
Fax 476010

Norðdepil
Tel. 475090
Fax 476008

Viðareiði
Tel. 475091
Fax 476009

## Telefon- og faxtænastan

Tel. 319494 · Fax 319454

## Kort burturmist eftir avgreiðslutíð

Tel. +45 44892929

## Umboðsráð

## Klaksvíkar Kommuna

Óli Marnar Christiansen, Klaksvík
Jógvan Clementsen, Klaksvík
Hilmar S. K. Danielsen, Klaksvík
Rúni Heinesen, Klaksvík
Søren Ziska Jacobsen, Klaksvík
Jóhann Joensen, Klaksvík
Finn Kjølbro, Klaksvík
Álvur Klakk, Klaksvík
Tummas J. Lervig, Klaksvík
Jákup Mikkelsen, Klaksvík
Victor Nielsen, Klaksvík
Heini Ósá, Klaksvík
Erling Petersen, Klaksvík
Eli Poulsen, Klaksvík
Jóhan Andrias Reyðberg, Klaksvík
Ólavur Samson, Klaksvík
Finnur Sivertsen, Klaksvík
Olivur Thomsen, Klaksvík
Jóhanna á Tjaldrafløtti, Klaksvík
Kalli Váðklett, Klaksvík
Jógvan Vágsheyg, Klaksvík
Hergerð Ziskason, Klaksvík

## Eystan Múlan

Absalon í Buð, Hvannasund
Jógvan E. á Geilini, Svínoy
Hanus Suni Hansen, Hattarvík
Hans J. Kallsberg, Viðareiði
Jákup Petersen, Viðareiði
Tórhallur Staksá, Viðareiði

## Kalsoy og Kunoy

Jógvan Heinesen, Kunoy
Jógvan Joensen, Trøllanes

## Leirvík og Føroyar annars

Peder T. Haahr, Signabøur
Jóannes Hansen, Toftir
Tórbjørn Jacobsen, Glyvrar
Eyðálvur M. Joensen, Svínáir
Jógvan E. Joensen, Leirvík
Edmunda Langgaard, Leirvík
Kjartan Mørkøre, Tórshavn
Bergur á Reynatrøð, Runavík
Joan Ziskason, Tórshavn

## Nevnd

Óli Marnar Christiansen, *formaður,* Klaksvík
Finn Kjølbro, *næstformaður,* Klaksvík
Jógvan Joensen, Trøllanes
Álvur Klakk, Klaksvík
Páll Klettskarð, Haraldssund
Erling Petersen, Klaksvík
Sigrun Heimistovu, Klaksvík
*starvsfólkaumboð*
Elmar Poulsen, Klaksvík
*starvsfólkaumboð*
Sigrun B. Skálagarð, Klaksvík
*vald av Búskaparmálaráðnum*

## Stjórn

Eyðfinn Reyðberg, Klaksvík

## Grannskoðan

Martin Gaard,
løggildugur grannskoðari, København
Símun Absalonsen,
skrásettur grannskoðari, Tórshavn

| Navn | Telefon | Telefax | Teldupostur |
|---|---|---|---|
| **Stjórn** | | | |
| Eyðfinn Reyðberg | 475000 | 476000 | eydfinn@ns.fo |
| **Klaksvík** | | | |
| **Avgreiðsludeildin** | | | |
| Jákup Olsen, *leiðari* | 475065 | 476000 | jakup@ns.fo |
| Anna Müller Jacobsen | 475042 | 476000 | anna@ns.fo |
| Beinta Vágsheyg | 475038 | 476000 | beinta@ns.fo |
| Betty Joensen | 475022 | 476000 | betty@ns.fo |
| Bjørg Johannesen | 475039 | 476000 | bjorg@ns.fo |
| Jórun Mathisen | 475014 | 476000 | jorun@ns.fo |
| Lív Mellemgaard | 475017 | 476000 | liv@ns.fo |
| Marjun Hansen | 475013 | 476000 | marjunh@ns.fo |
| Ninni Simonsen | 475010 | 476000 | ninni@ns.fo |
| Sigrun Heimistovu | 475016 | 476000 | sigrun@ns.fo |
| Súsanna Lydersen | 475044 | 476000 | susanna@ns.fo |
| Ranvá Isaksen | 475036 | 476000 | rannva@ns.fo |
| Ruth Baldvinsson | 475018 | 476000 | ruth@ns.fo |
| **Privatkundadeildin** | | | |
| Marjun E. Joensen, leiðari | 475046 | 476001 | marjunj@ns.fo |
| Annubeth Absalonsen | 475047 | 476001 | annubetha@ns.fo |
| Annubeth Sørensen | 475021 | 476001 | annubeths@ns.fo |
| Elmar Poulsen | 475043 | 476001 | elmar@ns.fo |
| Herfrí Sørensen | 475037 | 476001 | herfri@ns.fo |
| Ingun Joensen | 475015 | 476001 | ingun@ns.fo |
| Thorleif S. Joensen | 475045 | 476001 | thorleif@ns.fo |

| Navn | Telefon | Telefax | Teldupostur |
|---|---|---|---|
| **Vinnudeildin** | | | |
| Eyðun Kjølbro, leiðari | 475055 | 476002 | eydunk@ns.fo |
| Guðrið Lava Olsen | 475052 | 476002 | gudrid@ns.fo |
| Julianna Thomsen | 475012 | 476002 | julianna@ns.fo |
| Maria á Lakjuni Simonsen | 475053 | 476002 | maria@ns.fo |
| Mása Tróndheim | 475081 | 476002 | masa@ns.fo |
| **Fyrisiting** | | | |
| Marner Mortensen, leiðari | 475070 | 476003 | marner@ns.fo |
| Durid Færø | 475041 | 476003 | durid@ns.fo |
| Eyðun Nolsøe | 475072 | 476003 | eydunn@ns.fo |
| Janus Joensen | 475082 | 476003 | janus@ns.fo |
| Marianna Hansen | 475069 | 476003 | marianna@ns.fo |
| Petra Nysted | 475051 | 476003 | petra@ns.fo |
| Tummas Martin Anthoniussen | 475054 | 476003 | tummas@ns.fo |
| **Marknaðardeildin** | | | |
| Gunnar Nolsøe, *leiðari* | 475064 | 476003 | gunnar@ns.fo |
| **Norðdepil** | | | |
| Alvilda Simonsen | 475090 | 476008 | alvilda@ns.fo |
| **Viðareiði** | | | |
| Alvilda Simonsen | 475091 | 476009 | alvilda@ns.fo |
| **Leirvík** | | | |
| Kristian Martin Eliasen | 475100 | 476010 | kristianm@ns.fo |
| Mary-Jana á Reynatrøð | 475101 | 476010 | mary-jana@ns.fo |


SILVI

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

| Lyklatøl | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 31,0 | 32,5 | 30,1 | 29,2 | 29,6 |
| Kjarnukapitalprosent | 31,0 | 32,5 | 30,1 | 29,2 | 29,6 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 11,1 | 12,5 | 12,7 | 9,3 | 8,7 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 9,0 | 10,3 | 10,0 | 7,5 | 6,8 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,6 | 1,8 | 1,8 | 1,6 | 1,6 |
| Rentuváði | 2,4 | 2,2 | 2,6 | 1,6 | 1,0 |
| Gjaldoyrastøða | 1,0 | 0,5 | 0,2 | 0,2 | 0,1 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 88,5 | 86,5 | 93,9 | 99,5 | 107,6 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 277,8 | 279,9 | 227,7 | 158,6 | 106,9 |
| Stórir kundar tilsamans | 31,6 | 29,6 | 33,5 | 43,1 | 17,6 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,5 | 0,1 | 0,0 | 0,1 | 0,4 |
| Burturleggingarprosent | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,2 | 3,2 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | 0,8 | 0,6 | 0,6 | 0,5 | 0,3 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 3,5 | 10,1 | 14,0 | 12,0 | 9,2 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,5 | 3,4 | 3,5 | 3,7 | 3,7 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 46.811 | 51.551 | 55.816 | 57.464 | 58.197 |
| Virðisjavnan | 1.913 | 2.250 | 3.125 | -1.282 | -471 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 0 | 0 | 267 | -40 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 888 | 1.236 | 2.841 | 532 | 672 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **49.612** | **55.037** | **61.782** | **56.981** | **58.358** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 23.746 | 25.682 | 28.706 | 29.417 | 32.705 |
| Avskrivingar, føst ogn | 972 | 1.056 | 940 | 1.115 | 1.069 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | 5.562 | 4.159 | 4.967 | 4.654 | 2.684 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **19.332** | **24.140** | **27.169** | **21.795** | **21.900** |
| Skattur | 3.632 | 4.298 | 5.832 | 4.333 | 4.753 |
| **Ársúrslit** | **15.700** | **19.842** | **21.337** | **17.462** | **17.147** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 632.742 | 696.577 | 793.904 | 888.997 | 970.605 |
| Lánsbrøv | 236.596 | 263.529 | 244.126 | 174.049 | 156.101 |
| Innlán | 744.009 | 836.654 | 879.845 | 924.263 | 932.098 |
| Javni | 938.010 | 1.053.574 | 1.114.922 | 1.177.590 | 1.202.537 |
| Eginpeningur | 182.772 | 202.843 | 224.305 | 242.426 | 259.576 |

# TIL ÁBYRGDARAR OG VIÐSKIFTAFÓLK SPARIKASSANS



Eyðfinn Reyðberg
sparikassastjóri

10. mars í ár eru tíggju ár liðin, síðani sparikassin hevði sín fyrsta ábyrgdarafund, samstundis sum hetta eisini er 10-ára dagurin fyri, at fyrsta umboðsráðið varð valt. Vit hava verið, og eru sera fegin um ábyrgdaraskipanina, sum viðskiftafólk okkara eisini hava tikið væl ímóti, men alt broytist, treyðugt so. Ábyrgdaraskipanin skal dagførast í næstum og fyrsta broytingin verður, at stóri ábyrgdarafundurin í fyrstu atløgu verður fluttur, soleiðis at hetta verður í nánd av degnum, Norðoyatunnilin letur upp.

Á seinasta ábyrgdarafundi vóru ikki færri enn 1.000 fólk. Hetta er á markinum fyri, hvussu nógv fáa verið í ítróttarhøllini og tí er hugsandi, at vit næstu ferð hava ábyrgdarafund bæði fríggjakvøld og leygarkvøld.

Týsdagin 1. februar broytti sparikassin upplatingartíðirnar í Klaksvík og Leirvík frá kl. 9 til 9.30. Í einari tíð, har høgt tænastustøði er av stórum týdningi og eitt av barometrunum fyri eina vælvirkandi fyritøku, kann í fyrstu atløgu tykjast, sum fara vit øvutan veg. Men broytingin skal síggjast í ljósinum av, at umráðandi er at kunna savna øll starvsfólkini í senn, tí hetta letur upp fyri eitt nú øktum innanhýsis samskifti, kunning og menning. Sum frálíður fer hetta eisini at tryggja viðskiftafólkunum eina enn betri tænastu.

Krøvini til samskifti og kunning gerast alsamt størri. Á 80-ára stovningardegi sparikassans fyri góðum fimm árum síðani, varð blendað upp fyri nýggju heimasíðu sparikassans. Í hesum døgum verður arbeitt við einari nýggjari, spennandi og sera brúkaravinarligari heimasíðu, sum ætlandi verður tøk seinast í mars.

Sum nevnt aðrastaðni í ársfrásøgnini, hevur sparikassin tikið nýggja telefonskipan í nýtslu. Skipanin, har øll starvsfólk hava tráðleysa telefon, umframt at tað er lætt at staðfesta, um starvsfólk eru bundin av øðrum uppgávum og sostatt ikki fáa tikið telefonina, hevur virkað væl, og sum skilst, eru vit munandi lættari at fáa fatur á nú.

Fasta sambandið undir Leirvíksfirði nærkast nú av álvara. Hetta gevur okkum nógvar fyrimunir, eins og hetta letur upp fyri nógvum møguleikum. Men samstundis er hetta eisini ein stór avbjóðing fyri Klaksvík og norðoyingar.

Sparikassin hevur í fleiri ár fyrireikað seg til fasta sambandið, sum eitt nú leggur upp til, at vit í størri mun kunnu røkka og røkja kundar aðrastaðni í Føroyum. Og hesari avbjóðing eru vit til reiðar at lofta.

Í fjør rundaði Norðoya Sparikassi tey 85. Vit settu okkum fyri at hátíðarhalda dagin alt árið við bæði tiltøkum og øðrum virksemi. Vit vilja fegin nýta høvi at takka øllum, sum so ella so hava luttikið ella á annan hátt tikið undir við øllum hesum. Uttan tykkum var onki.

Við ynski um alt tað besta



Eyðfinn Reyðberg
sparikassastjóri

# ÁRIÐ, IÐ FÓR

## 2004 í orðum og myndum



## NORÐOYA SPARIKASSI 85 ÁR

### Fram í ljósið

24. september var 85-ára stovningardagur Norðoya Sparikassa og í hesum sambandi varð skipað fyri ymiskum tiltøkum gjøgnum árið. Fyrsta tiltakið var á Grækarismessu, tá listaframsýningin Fram í ljósið, ið er framsýning fyri ókend og minni kend listafólk, læt upp í Skálanum í Klaksvík. Og áhugin var stórur; 61 listafólk sýndu fram 235 listaverk, 1.500 fólk vitjaðu framsýningina og 66 verk vórðu seld. Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, setti framsýningina og Magni Husgaard fjálgaði um við livandi tónleiki.



Eini 200 fólk høvdu leitað sær í Skálan til ferniseringina á Grækarismessu







Umleið 1.500 fólk vitjaðu lista-framsýningina Fram í ljósið, ið var opin frá 12. til 21. mars

FRAM Í LJÓSIÐ









Jákup Olsen, avgreiðsluleiðari



Við livandi tónleiki avrundaðu Birthe og Regin Rasmussen framsýningina. Eisini taldist Birthe millum luttakandi listafólkini





Fram í ljósið var heitið á listafram-sýning, har ókend og minni kend listafólk kundu sýna fram











# NORÐOYA SPARIKASSI 85 ÁR

NORÐOYA SPARIKASSI 85 ÁR

Væleydnað kaffiborð leygarmorgunin

Morgunkaffið, sparikassin bjóðaði leygarmorgunin, var partur av 85-ára haldi sparikassans og ein góð byrjan til fyrsta Summarfestivalin, har sparikassin eisini var høvuðsstuðul.

Og við góðum bakstri á borðunum og góðum tónleiki á pallinum var lagt upp til eina góða løtu.

Bæði bakaríini í býnum, Hjá Jórun og Hjá Símun, høvdu verið í sving alla náttina, soleiðis at rundstykkir, kringlustykkir og kransakøkur vóru á borðunum til mongu gestirnar, meðan kaffimaskinurnar í Betesda bryggjaðu einar 5.000 koppar av kaffi umframt te.

Og sum ein góð byrjan til Summarfestivalin, sum av álvara fór av bakkastokki seinrapartin, var eisini góður tónleikur á Sparikassapallinum, hiðani Klaksvíkar Hornorkestur, Mása Tróndheim, Brandur Enni, Guðrun Sólja Jacobsen, Gunnar Mikkelsen, Petsi Tvørfoss og Arnfríð Lützen framførdu, eins og Silvi eisini var á palli. Harumframt nýttu fleiri hundrað børn og ung høvi at fáa autograf frá Gunnari Mikkelsen, Guðruni Sólju Jacobsen og Brandi Enni.

Eftir borðhaldið varð bakstur eisini latin ellis- og røktarheimunum í Klaksvík.










# S u m m a r f e s t i v a l u r i n

Frá hóskvøldinum 12. til sunnukvøldið 15. august varð skipað fyri sera væleydnaða Summarfestivalinum í Klaksvík.

Við stóra morgunmatarborðið helt Eyðfinn Reyðberg, sparikassa-stjóri, røðu. Hann segði m.a.:

»Árið í ár er eisini eitt heilt serstakt ár hjá Norðoya Sparikassa. Sparikassin varð settur á stovn hin 24. september 1919, og kann tí halda 85-ára stovningardag í ár. Sparikassin hevur vanliga hildið eina móttøku, tá eitt 5-ára tíðarskeið er rundað, seinast tá sparikassin helt 80-ára stovningardag. Hetta er tó fyrstu ferð, at vit halda eina móttøku á slíkan hátt. Orsøkin til hetta er einføld. Vit ynsktu at royna, um tað ikki bar til at geva fleiri av okkara viðskiftafólkum møguleikan at vera við til hesa móttøku. Og tá hetta kundi lata seg gera á henda hátt – har vit kundu gerast ein partur av skránni á Summarfestivalinum – ja, so hildu vit at hetta var heilt upplagt. Og lat meg siga tað beinanvegin, nú eg standi og skoði hesa stóru mannfjøld, sum er savnað her í morgun, at soleiðis skal ein móttøka vera – eingin ivi um tað.

Hendan vikan hevur eisini víst – og fer at vísa – at vit hava fingið fatur í tí, sum skal til, skal hetta lokaløki koma sigrandi burturúr teimum avbjóðingum, sum nýggja sambandið um Leirvíksfjørð fer at geva okkum. Neyðugt er tá við samanhaldi, og at allar góðar kreftir arbeiða saman um at skapa trivna og virksemi í lokaløkinum. Tað er tí at frøast um tann positiva hugburð og einleika, sum verður vístur í samband við hetta stóra summartiltak. Fyrireikarar, kommuna, handlandi, vinnulív – ja, vit øll – hava gjørt okkara til, at býurin í dag stendur klárur til at bjóða øllum íbúgvum og gestum vælkomnum hetta vikuskiftið.

Sparikassin fegnast um, at vit sleppa at vera ein partur av hesum tiltaki, tí vit hava sum aðalmál eftir førimuni at royna at vera ein virkin peningastovnur í einum virknum lokalsamfelagi, og á tann hátt kunnu avspegla tað lokalsamfelag, vit liva og virka í. Sum einasti lokali peningastovnur í Føroyum, vilja vit virka við til at staðfesta, at mangt kann fremjast, hóast vit búgva uttanfyri tað alsamt vaksandi miðstaðarøkið.«

Í samband við 85-ára stovningardagin, læt sparikassin tilsamans 500.000 kr., 250.000 kr. í part, til Leguhúsið í Nesvík og Zarepta.

Í hesum sambandi segði Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, m.a.:
»Nú børn og ungdómar aftur fara undir dagliga yrki sítt í skúlunum, kunnu vit staðfesta, at umleið 1/3 av øllum teimum føroysku børnunum og ungdómunum hevur verið á summarlegu í Leguhúsinum í Nesvík og á Zarepta. Okkurt um 2.700 børn hava luttikið á hesum kristiligu legum í summar, og er tað óivað met. Vit eiga øll at seta prís uppá hetta arbeiði, sum verður gjørt millum okkara ungdóm, og var tað við hesum í huga, at nevnd Norðoya Sparikassa viðgjørdi henda spurning. Vit eru takksom fyri, at bæði leguhúsini hava givið okkum loyvi til at stuðla virksemi teirra við einari peningaupphædd.

Vit ynskja báðum leguhúsunum alt tað besta, og vóna at hesin peningur kann vera við til at gera umstøðurnar hjá okkara ungdómi enn betri at savnast har.«




Norðoya Sparikassi var høvuðsstuðul hjá fyrsta Summarfestivalinum í Klaksvík


Hanus G. Johansen


Ken Hensley


Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags




Borðreitt varð við rundstykkjum, kringlu og kransakøku




Gunnar Mikkelsen, sum vann DR-kappingina Stjerne for en aften, framførdi eisini á Sparikassapallinum leygarmorgunin






Ein av fyrireikarunum Steintór Rasmussen


Boney M í sparikassanum




Hjarnar


Guðrun Sólja Jacobsen Stjerne for en aften 2003



Ítróttarnáttin byrjaði við stórari skrúðgongu

# Í t r ó t t a r n á t t i n

Fríggjakvøldið 20. august skipaði KÍ fyri fyrstu Ítróttarnáttini, ið var partur av bæði 100-ára hátíðarhaldinum hjá KÍ og 85-ára stovningardegi sparikassans. Byrjað varð við skrúðgongu við Klaksvíkar Hornorkestri, ítróttarfólkum, brandbili, fólki á rossabaki og Silva.

Nógv fólk bæði vitjaðu og beinleiðis luttóku í tiltøkunum, sum vóru ókeypis og samansett við ítróttarfeløgum, frítíðarfeløgum og samkomum.

Norðoya Sparikassi var høvuðsstuðul til Ítróttarnáttina.



Steinbjørn O. Jacobsen, borgmeistari, heldur røðu



Finn Johannesen samskipaði Ítróttarnáttina



Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, setur ítróttarnáttina

# 1'arin

85-ára stovningardag sparikassans fór nýggja kontan – 1’arin – av bakkastokki. Og áhugin var stórur heilt frá byrjan.

1’arin er uppsparing, ið hevur eina sera høga rentu, ið er tryggjað eitt ár í senn. Til 24. september 2005 er rentan sostatt 3,5%. Hóast høgu rentuna er ongin uppsagnartíð; tað vil siga, at tú altíð kanst taka út av 1’aranum, men hinvegin ber bara til at seta inn í eitt avmarkað tíðarskeið hvørt ár. Fyrsta tíðarskeiðið var frá 24. september til 24. oktober 2004 og hægsta upphæddin, setast kundi inn, var 85.000 kr.












Jól í sparikassanum

Við Silvajólakalendara, nýggjum Silvaspølum á heimasíðuni, spennandi Silvavinningum og jólahugna uttanfyri sparikassarnar í Klaksvík og Leirvík hátíðarheldur sparikassin eisini 85-ára dagin í desember.

Jól í Leirvík

Sera nógv fólk høvdu leitað sær oman á sparikassaøkið í Leirvík fríggjadagin 17. desember. Skipað varð fyri tónleiki og undirhaldi á Sparikassapallinum, har Klaksvíkar Hornorkestur, unga stjørnuskotið Ingibjørg Hansen, Magni Christiansen, Salt, Mása Tróndheim og Jóhan í Kollafirði vóru á palli. Eisini varð nýggj sponsoravtala undirskrivað við Svimjifelagið Reka, eins og bæði Silvi og jólamaður vitjaðu.




















Betty Joensen



Marie Sivertsen



Eyðun Nolsøe

# ÚTBÚGVING OG STARVSFÓLK

## Útnorðursamstarv fevnir eisini um sparikassan

Fleiri av starvsfólkum sparikassans hava farnu árini í styttri tíðarskeið starvast í útlendskum peningastovnum, eins og starvsfólk í útlendskum peningastovnum eisini hava roynt seg í Norðoya Sparikassa. Eitt teirra er Betty Joensen, sum eftir egnum ynski hevur starvast í Grønlandsbanken í summar.

Eyðun Nolsøe, starvsfólkaleiðari, sigur, »at tað at okkara starvsfólk kunnu starvast aðrastaðni, umframt skeiðs- og útbúgvingarmøguleikar, er við til at tryggja sparikassanum eitt gott førleikastøði eins og hetta gevur okkum innlit í - letur okkum staðfesta, hvat vit gera gott og hvat vit kunnu gera betri. Í júst hesum føri vendu vit okkum til Grønlandsbanken, har avtalað varð, at Betty skuldi starvast hjá Grønlandsbanken í juni, juli og august mánað í ár, meðan Marie Sivertsen frá Grønlandsbanken skuldi starvast í Norðoya Sparikassa sama tíðarskeið.«

## Hóast føroysk foreldur er Marie grønlendari

Foreldrini hjá Marie eru Selma og John Tindalíð. Selma er ættað úr Fuglafirði, meðan John er ættaður sunnan úr Vági. Kortini er Marie født og uppvaksin í Grønlandi.

Hon hevur starvast í Grønlandsbanken síðani 1999 og arbeiðir við eitt nú kundaráðgeving. Marie er gift við Svend Sivertsen, ið er ættaður úr Nuuk og útbúgvin arkitektur. Pápi Svend er Hans Sivertsen úr Klaksvík.

Í Grønlandsbanken starvast tilsamans 84 fólk, harav 61 eru í Nuuk, meðan hini 23 eru býtt út á tær fýra deildirnar, ið eru í Qaqortoq, Maniitsoq, Ilulissat og Sisimiut.



Við 9.500 deildum í 79 londum er HSBC (Hong Kong Shanghai Bank Corporation) ein av heimsins størstu bankum. Í Bretlandi starvast 200.000 fólk í bankanum



Vitjað varð eitt nú í Nordea, Den Danske Bank, Allied Irish Bank, European Bank for Reconstruction and Development, Invesco Perpetual, Bloomberg og The Metal Exchange




Anna uttanfyri HSBC






Frálæra varð eitt nú givin í ensku skattaskipanini og samskifti í fjølmentaðum umhvørvi

Frá mánadegnum 1. mars og fimm vikur fram var Anna Müller Jacobsen í London, har hon tvær tær fyrstu vikurnar var á skeiði, sum var á Hammersmith College, meðan hon tríggjar tær seinru vikurnar starvaðist á HSBC (Hong Kong Shanghai Bank Corporation). Fýra til átta starvsfólk úr danska, grønlendska og føroyska fíggjarheiminum hava atgongd til skipanina, ið Finanssektorens Uddannelsescenter leggur til rættis. Skeiðið vendir sær til starvsfólk, ið eru millum 25 og 35 ár





1. september varð Súsanna Lydersen liðug við sína útbúgving sum sparikassakvinna ella sparikassaatstøðingur, sum rætta heitið er. Súsanna heldur fram í sparikassanum og fór harumframt í vetur undir Akademiuddannelse i Finansiel rådgivning, ið er ein víðari útbúgving innan fíggjarøkið

Sum partur av útbúgvingini, starvaðist Pól í Skorini í hálvan triðja mánað seinasta summar á vinnudeildini í Norðoya Sparikassa. Pól lesur til cand. merc. jur. á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn og verður liðugur á sumri 2005





Hálvan mai byrjaði Janus Joensen aftur í starvi á fyrisitingardeild sparikassans. Janus hevur verið í farloyvi síðani januar í 2002, tá hann fór til Danmarkar at lesa til datamatikara (Advanced Computer Science). Janus hevur lisið á Tietgenskúlanum í Odense



1. februar kann Kristian Martin Eliasen hátíðarhalda 25-ára starvsdag í Norðoya Sparikassa



Frá kl. 15 til 18 sendir Rás 2 beinleiðis frá móttøkuni í Leirvík. Á myndini eru Petur Jacobsen, Sonne Smith og Oliver Joensen





Nógv fólk eru til móttøkuna, ið verður hildin fyri Kristiani Martini hósdagin 19. februar





Hósdagin 19. februar er móttøka fyri Kristian Martini





1. oktober hava Elmar Poulsen og Eyðun Nolsøe ávikavist 30- og 20-ára starvsdag í Norðoya Sparikassa. Í samband við dagin letur Norðoya Sparikassi Elmari og Eyðuni hvør sína tekning, sum Óli P. hevur gjørt. Á myndini eru Óli P., Elmar Poulsen, Eyðun Nolsøe og Eyðfinn Reyðberg





Sigrun Heimistovu



Elmar Poulsen



Julianna Thomsen



Herfrí Sørensen

# SPARIKASSIN

## Starvsfólkaumboðan

Síðani 1996 hava starvsfólkini í Norðoya Sparikassa verið umboðað í nevnd sparikassans. Valskeiðið er fýra ár og veljast skulu tveir nevndarlimir og tveir varalimir. Á valinum hesaferð vórðu vald Sigrun Heimistovu og Elmar Poulsen, meðan varafólk teirra eru ávikavist Julianna Thomsen og Herfrí Sørensen.



Álvur Klakk varð afturvaldur á aðalfundi sparikassans



Páll Klettskarð varð afturvaldur á aðalfundi sparikassans



Mánadagin 29. februar varð nýggj sjálvtøka sett upp á høvuðsskrivstovu sparikassans. Hetta er triðja sjálvtøkan, og í mun til tær báðar undanfarnu, kann nýggja sjálvtøkan eisini útflýggja 200 og 500 kr. seðlar. Frammanundan er sama slag av sjálvtøku á deildini í Leirvík



Umframt høvuðsdeildina hevur Norðoya Sparikassi í nøkur ár havt tvær deildir í Klaksvík. Men í 2001 varð deildin á Kósini latin aftur og týsdagin 27. juli 2004 læt eisini deildin við Klaksvíksvegin aftur.

Seinastu árini er arbeiðið á deildini minkað munandi, og kemst hetta serliga av, at viðskiftafólk í stóran mun nýta gjaldskort eins og fleiri og fleiri hava fingið sær spar2 ella HeimaGreiðslu. Sostatt er tørvurin á fleiri deildum í Klaksvík minkaður munandi, eins og færri deildir eisini geva øktar møguleikar fyri betri tænastu á øðrum økjum.

Hóast Norðoya Sparikassi læt eina deild aftur, vórðu ongi starvsfólk uppsøgd.

Norðoya Sparikassi hevur annars deild í Norðdepli, á Viðareiði og í Leirvík



Mánadagin 6. desember tekur Norðoya Sparikassi nýggju telefonskipanina TotalView í nýtslu. Við nýggju skipanini, har øll starvsfólk hava tráðleysa telefon, verður miðað eftir einum munandi hægri tænastustøði. Skipanin er føroysk og ment av Formula Føroyar. Ninni Simonsen er høvuðsrødd sparikassans úteftir



Absalon í Buð er uppboðssøluhaldari, tá gomlu kappróðrarbátarnir, »Ritan« og »Norðingur«, verða seldir á uppboðssølu. Bátarnir fara fyri ávikavist 12.000 kr. og 9.000 kr.



Nógv fólk vóru samankomin til tiltakið



Manningin, sum mannaði Norðing í sekstiárunum



Ein vælfagnaður Silvi á palli



Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, og Niels í Buð, formaður í Norðdepils/Hvannasunds Róðrarfelag, skriva undir sponsoravtalu



Við einum sannførandi sigri á Vestanstevnu tryggjar Sundabáturin sær føroyameistaraheitið og við einum øgiligum spurti vinnur Sundabáturin eisini Ólavsøkuróðurin

## SPARIKASSIN STUÐLAR

### 4. juli í Norðdepli

Sunnudagin 4. juli skipar Norðdepils/Hvannasunds Róðrarfelag fyri forkunnugum tiltaki á keiøkinum í Norðdepli. Á skránni eru kappingar, undirhald og café. Eisini rógva kappróðrarbátar felagsins á sundinum, uppboðssøla er av gomlu bátunum, Silvi vitjar, eins og Klaksvíkar Hornorkestur setur sín dám á dagin.

Norðdepils/Hvannasunds Róðrarfelag skrivar eisini undir tvær sponsoravtalur, harav onnur er við Norðoya Sparikassa.



Sunnudagin 5. september undirskriva Klaksvíkar Talvfelag og Norðoya Sparikassi nýggja sponsoravtalu. Avtalan er galdandi í trý ár og umframt vanliga stuðulin er innbygd ein serlig bonusskipan, gerst felagið nr. 1, 2 ella 3 í Føroyameistarakappingini. Her eru Petur Hans Poulsen, formaður í Klaksvíkar Talvfelag, og Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, avmyndaðir í Skákinum, beint eftir at avtalan er undirskrivað.





Martin, Jens Ove, Mogens, Heini, Emil, Sævar, Ólavur og Rani

Leygarkvøldið 4. september endar talvkappingin 3rd Klaksvík International 2004. Vinnari gerst danin Jens Ove Fries Nielsen, nr. 2 verður sviin Emil Hermansson, meðan okkara egni Heini Olsen gerst nr. 3. Heina vantaði bert eitt stig í at vinna sín næsta IM-norm (International Master). Umframt IM-heitið (tríggir IM-normar) hava Jens Ove og Emil eisini hvør sín GM-norm (Grand Master).

Seks luttakarar vóru til kappingina og vóru teir, umframt vinnararnar, Sævar Bjarnason úr Íslandi, og Ólavur Simonsen og Martin Poulsen úr Føroyum. Mogens Nielsen, IA, (International Arbiter ella altjóða dómari) hevur havt ábyrgdina av kappingini øll trý árini. Norðoya Sparikassi letur virðislønirnar.

Favorittarnir Emil Hermansson og Jens Ove Fries Nielsen



Norðoya Sparikassi stuðlaði eisini Football ’04, ið er serligur fótbóltsskúli til dreingir og gentur í aldrinum 10 til 16 ár. 140 næmingar eru á skúlanum, ið er frá 3. til 5. august. Høvuðsvenjari er Andy Williams frá Liverpool FC



## KÍ FRÁLÍK ÚRSLIT

Sigursrøðin hjá KÍ-kvinnunum heldur eisini fram í 2004. Triðja árið á rað gerast tær greipuvinnarar, meðan 2004 gerst árið, KÍ-kvinnurnar á fimta sinni vinna føroyameistaraheitið. Harumframt vera tær, fjórða árið á rað, við í Europa-cup. Á KÍ 100-ára gallaveitsluni 13. november verður venjarin hjá KÍ-kvinnunum, Jón Harald Poulsen, kosin Ársins KÍ’ari.

Eisini í yngru deildunum roynist árið sera væl, ikki minst fyri KÍ-smádreingirnar, sum eisini gerast greipuvinnarar.

Leygardagin 18. september vinna tvey av yngru liðunum hjá KÍ føroyameistaraheitið. Henda dagin spæla KÍ-pinkurnar seinra finaluumfarið og vinna allar sínar dystir og gerast sostatt føroyameistarar annað árið á rað.

Tað eru gingin heili 20 ár, síðani KÍ seinast vann piltadeildina, sum er fyri dreingir millum 10 og 12 ár, og tá var annar av núverandi venjarunum, Eyðun Klakstein, sjálvur á liðnum. Men í ár bar til, tí í seinasta og avgerandi dystinum vunnu KÍ-piltarnir, sum avgjørt eru í serflokki, stórsigur. Hin venjarin er KÍ-formaðurin Gestur Hovgaard.

Fyri KÍ-dreingirnar roynist árið eisini væl, tí tá avtornar, vinna teir silvur.

Norðoya Sparikassi er bæði høvuðsstuðul hjá 1. deild kvinnum og ungdómsstuðul hjá KÍ, og vit ynskja øllum liðunum hjartaliga tillukku!



Greipuvinnarar 2004: KÍ 1. deild kvinnur saman við venjaranum Jón Haraldi Poulsen og fysioterapeutinum Jóngerð Biskopstø



Greipuvinnarar 2004: KÍ-smádreingir saman við venjarunum Finni Johannesen og Hans Jacobi Heinesen



Føroyameistarar 2004: KÍ-pinkur saman við venjarunum Báru Skaale Klakstein og Honnu Mikkelsen



Føroyameistarar 2004: KÍ-piltar saman við venjarunum Eyðuni Klakstein og Gesti Hovgaard. Hetta er annars fyrstu ferð í 20 ár, at KÍ-piltarnir eru á ovastu rók. Seinast var í 1984, tá annar av núverandi venjarunum hjá piltunum, Eyðun Klakstein, sjálvur spældi á piltaliðnum



Silvurvinnari 2004: KÍ-dreingir saman við venjarunum Allani Joensen og Meinhardi Joensen

Mikudagin 10. november skrivaðu Eyðfinn Reyðberg fyri Norðoya Sparikassa og Eyðbjørn Andreasen, formaður í Mjølni, undir nýggja sponsoravtalu. Avtalan er galdandi fyri 2004, 2005 og 2006 og umfatar allan barna- og ungdómshópin hjá Mjølni



Norðoya Sparikassi stuðlaði Sjómanskirkjuni í Hull í samband við at 50 ár vóru liðin, síðani sjómanskirkjan varð endurvígd. Á myndini eru Heini Ziska Dahl og Kristoffur Joensen frá Føroysku Sjómanskirkjuni, Hjørdis Hammer úr Skúoy Kjærgaard, sjómansprestur, og Hans Jacob Joensen, biskupur



## SPARIKASSIN STUÐLAR

Umframt eitt virkið vinnulív hevur útboðið av frítíðarvirksemi, saman við teimum hugskotum, ið hvør sær kann fáast við, alstóran týdning fyri eitthvørt samfelag, tað veri seg lítið, stórt ella lokalt. Sparikassin telist ofta millum stuðlarnar, og millum teirra, ið sparikassin hevur stuðlað farna árið, eru m.a. hesi:

Alzheimerfelagið; Amnesty International; Blái Krossur; Bókadeild Føroya Lærarafelags; Brandur Enni; Cheerleaders; Deyvafelag Føroya; Diabetesfelag Føroya; Dragin; European Business Game; Fiskivinnuskúlin; Føroya Felag móti Krabbameini; HSF (Hondbólts Samband Føroya); I Am; Klaksvíkar Billardfelag; Klaksvíkar Brigdefelag; Klaksvíkar Fimleikarfelag; Klaksvíkar Hornorkestur; Klaksvíkar Ítróttarfelag; Klaksvíkar Sjónleikarfelag, Klaksvíkar Talvfelag; LÍF; Koltursgrunnurin; Leguhúsið í Nesvík; Lions Club, Klaksvík; Ljósmøðrafelag Føroya; Maria Anderssen; Meginfelag Teirra Brekaðu; Mjølnir; Norðdepils/Hvannasunds Róðrarfelag; Reyði Krossur; 17 Sangarar; Salt; Sjómanskirkjan í Hull; Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn; Summarfestivalur ’04; Svimjifelagið Ægir; Talvkappingin 3rd Klaksvík International og Zarepta.

Stuðlað av Tónleikagrunni Norðoya Sparikassa:
Aria; Arnfríð Lützen og Ingi Isaksen; Deja Vu; Headache Blues Treo; Jóhan Hentze og Kristina Elisabeth Mørkøre.



Ken Hensley roynir nýggju
sjálvtøkuna í Norðoya Sparikassa

# ÁRSFRÁGREIÐING

## Ársúrslitið

Ársúrslitið áðrenn skatt í 2004 gjørdist 21,9 mió.kr. Hetta er ein hækking uppá 0,1 mió.kr. í mun til árið fyri, tá úrslitið áðrenn skatt var 21,8 mió.kr.

Endaliga ársúrslitið eftir skatt gjørdist 17,1 mió.kr. ímóti 17,5 mió. kr. í 2003.

## Inntøkur

Nettorentuinntøkurnar gjørdust 0,3 mió.kr. hægri í 2004 enn árið fyri. Útlánsvøksturin í 2004 var hægri enn innlánsvøksturin, og hevur sparikassin, eins og undanfarna ár, lækkað rentumarginalin. Hetta sæst eisini aftur í nettorentuinntøkunum.

Nettorentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 58,2 mió.kr. í 2004 ímóti 57,5 mió.kr. í 2003, ein vøkstur uppá 0,7 mió. kr., svarandi til 1,3%.

Sparikassin hevði í 2004 eitt tap av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra uppá 0,5 mió. kr., móti einum tapi í 2003 uppá 1,3 mió. kr. Hetta viðførir eina nettoávirkan uppá 0,8 mió. kr. samanborið við 2003.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur vóru 29,8 mió. kr. í 2004 ímóti 29,0 mió. kr. í 2003. Ein vøkstur uppá 0,8 mió. kr., svarandi til 2,9%. Hesin vøkstur stavar í høvuðsheitinum frá hækkingum í sáttmálabundnum lønum.

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum eru í 2004 1,1 mió. kr., ið er umleið tað sama sum í 2003.

Aðrar vanligar útreiðslur vóru 2,9 mió. kr. í 2004, móti 0,4 mió. kr. í 2003. Henda hækking stavar frá øktum útgjaldi úr gávugrunninum. Av hesum eru 2,2 mió. kr. latnar Norðoyagrunninum, sum nú hevur tilsamans 5 mió. kr. at arbeiða við.

Nettoavskrivingar og burturleggingar uppá útlán vóru 2,7 mió. kr. í 2004 móti 4,7 mió. kr. í 2003.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið hjá Norðoya Sparikassa er gott. Við árslok 2004 var gjaldførið 201 mió. kr. Gjaldførið er minkað við 57 mió. kr. Orsøkin til hetta er, at útlán sparikassans vaksa skjótari enn innlánini. Gjaldførið

við ársløk var 55% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans 21%. Lógin krevur her 10%.

Solvensur sparikassans vaks við 0,4%, frá 29,2% við ársløk 2003 til 29,6% við ársløk 2004. Lógin krevur 8%.

## Fíggjarstøðan

Útlán sparikassans vóru við ársløk 2004 971 mió. kr., og eru tey í árinum vaksin við 9,2%.

Innlánið er í sama tíðarskeiði økt við 0,8% og er nú 932 mió. kr.

Fíggjarstøða sparikassans vaks við 25 mió. kr. og javnvigar við 1.203 mió. kr. við ársløk 2004. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 2,1%.

Eginogn sparikassans er nú 260 mió. kr. Sparikassin hevði í 2004 eina renting av eginpeninginum áðrenn skatt uppá 8,7% móti 9,3% í 2003.

## Býti av ársúrsliti

Nevndin skjýtur upp, at av ársúrslitinum 17,1 mió. kr., saman við fluttum vinningi frá undanfarnum árum 236 mió. kr. og gávugrunninum 3 mió. kr., ella íalt 256 mió. kr., verða lagdar 1 mió. kr. í gávugrunnin, og 255 mió kr. verða fluttar til næsta ár.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið í sparikassanum var við ársløk 33,0 umroknað til fulla tíð, ímóti 34,1 fólkum í 2003. Ein lækking upp á 1,1 ársverk.

## Framtíðin

Eftir at roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa er avgreiddur, eru ikki hendar broytingar, ið eru av týdningi, tá metast skal um roknskaparúrslit og fíggjarligu støðu sparikassans.

Eftir at búskaparvøkstur í samfelagnum er steðgaður, er onki sum bendir á, at vend kemur í gongdina í 2005. Tó væntar sparikassin, at úrslitið fyri 2005 verður nakað hægri enn fyri 2004.



# ÁTEKNINGAR TIL ÁRSFRÁSØGNINA

Nevnd og stjórn Norðoya Sparikassa hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina
fyri 2004, ið vit viðmæla aðalfundinum at góðkenna.

Klaksvík, hin 1. februar 2005

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| Óli Marnar Christiansen<br>*formaður* | Finn Kjølbro<br>*næstformaður* | Jógvan Joensen |
| Álvur Klakk | Páll Klettskarð | Erling Petersen |
| Sigrun Heimistovu | Elmar Poulsen | Sigrun B. Skálagarð |

## Umboðsráðsvaldu grannskoðararnir

Vit hava grannskoðað ta av leiðsluni gjørdu ársfrásøgn 2004 fyri Norðoya Sparikassa.

## Grannskoðanin

Vit hava í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarreglur skipað og framt grannskoðanina við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársfrásøgnin er uttan týðandi villur ella vantar týðandi upplýsingar. Undir grannskoðanini hava vit eftir eini meting um týdning og tapsvanda kannað grundarlagið og prógv fyri tær í ársfrásøgnini nevndu upphæddir og aðrar upplýsingar. Vit hava samstundis tikið støðu til tann av leiðsluni valda roknskaparhátt og roknskaparligu metingar, eins og vit hava mett um upplýsingarnar í ársfrásøgnini sum heild eru nøktandi.

Tann framda grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til nakað fyrivarni.

## Niðurstøða

Okkara fatan er, at ársfrásøgnin er í tráð við tey krøv, ið lóggávan setur til roknskaparframløgu, og at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av sparikassans ogn og skuld, fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

| | |
|---|---|
| København, hin 1. februar 2005 | Tórshavn, hin 1. februar 2005 |
| Martin Gaard<br>*løggildugur grannskoðari* | Símun Absalonsen<br>*skrásettur grannskoðari* |

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | 68.803 | 69.911 |
| 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 14.488 | 15.870 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **54.315** | **54.041** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 90 | 44 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 3.971 | 3.546 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 179 | 167 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **58.197** | **57.464** |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -471 | -1.282 |
| 4 | Aðrar vanligar inntøkur | 672 | 532 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 29.834 | 28.985 |
| 6 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.069 | 1.115 |
| 7 | Aðrar vanligar útreiðslur | 2.871 | 432 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 2.684 | 4.654 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum fyritøkum | -40 | 267 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **21.900** | **21.795** |
| 23 | Skattur | 4.753 | 4.333 |
| | **Ársúrslit** | **17.147** | **17.462** |
| | **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| | Ársúrslit | 17.147 | 17.462 |
| | Flutt úr gávugrunni | 3.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 235.825 | 220.363 |
| | **Til taks tilsamans** | **255.972** | **238.825** |
| | Lagt í gávugrunn | 1.000 | 3.000 |
| | At flyta til næsta ár | 254.972 | 235.825 |
| | **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **255.972** | **238.825** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi | | |
| | uttan uppsøgn í tjóðbankum | 11.255 | 4.809 |
| 8 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 33.213 | 79.311 |
| 9 | Útlán | 970.605 | 888.997 |
| 10 | Lánsbrøv | 156.101 | 174.049 |
| 11 | Partabrøv o.a. | 729 | 724 |
| 11 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 15.556 | 15.596 |
| 12 | Ítøkiligar ognir | 10.430 | 10.496 |
| 13 | Aðrar ognir | 4.648 | 3.608 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.202.537** | **1.177.590** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 14 | Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| 15 | Innlán | 932.098 | 924.263 |
| | Onnur skuld | 8.135 | 7.969 |
| 16 | Burturleggingar til útreiðslur | 2.728 | 2.932 |
| | **Skuld tilsamans** | **942.961** | **935.164** |
| | | | |
| | **Eginpeningur** | | |
| 17 | Ábyrgdarpeningur | 3.604 | 3.601 |
| | Gávugrunnur | 1.000 | 3.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 237.825 | 218.363 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 17.147 | 17.462 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **259.576** | **242.426** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.202.537** | **1.177.590** |
| | | | |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 26.647 | 63.155 |
| | Aðrar ábyrgdir | 8.167 | 8.061 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **34.814** | **71.216** |

# KAPITALFLYTINGAR OG SOLVENSUPPGERÐ

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 3.601 | 2.942 |
| | Tilgongd í árinum | 83 | 705 |
| | Frágongd í árinum | 80 | 46 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **3.604** | **3.601** |
| | Gávugrunnur við ársbyrjan | 3.000 | 1.000 |
| | Flutt til yvirskotsbýti | 3.000 | 1.000 |
| | Flutt frá býti av ársvinningi | 1.000 | 3.000 |
| | **Gávugrunnur við ársenda** | **1.000** | **3.000** |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 235.825 | 220.363 |
| | Flutt frá gávugrunni, netto | 2.000 | -2.000 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 17.147 | 17.462 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | **254.972** | **235.825** |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **259.576** | **242.426** |
| | **Solvensuppgerð** | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg | 259.576 | 242.426 |
| | Ábyrgdarkapitalur aftaná frádrøg | 259.576 | 242.426 |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 826.421 | 734.843 |
| | Vektaði tøl undir strikuni | 15.011 | 49.489 |
| | Vektaði tøl við marknaðarváða | 36.712 | 46.981 |
| | **Vektaði tøl tilsamans** | **878.144** | **831.313** |
| | Solvensprosent sambært BSL §21, stk. 1 | 29,6% | 29,2% |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 29,6% | 29,2% |

# PENINGASTREYMSROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Rakstur** | | |
| | Ársúrslit eftir skatt | 17.147 | 17.462 |
| | Broytingar viðv. upphæddum uttan gjaldførisárin: | | |
| | Útsettur skattur | -151 | -32 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.069 | 1.115 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 2.684 | 4.654 |
| | Burturleggingar til útreiðslur | -53 | -59 |
| | **Íalt frá rakstri** | **20.696** | **23.140** |
| | **Rakstrarkapitalur** | | |
| | Útlán | -84.292 | -99.747 |
| | Innlán | 7.835 | 44.418 |
| | Aðrar ognir | -1.040 | -75 |
| | Onnur skuld | 166 | 221 |
| | **Íalt frá rakstrarkapitali** | **-77.331** | **-55.183** |
| | **Íløgur** | | |
| | Lánsbrøv | 17.948 | 70.077 |
| | Partabrøv | -5 | 197 |
| | Kapitalpartar | 40 | -10.946 |
| | Ítøkiligar ognir | -1.003 | -2.788 |
| | **Íalt frá íløgum** | **16.980** | **56.540** |
| | **Fígging** | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 3 | 659 |
| | Broytingar í gjaldføri | -39.652 | 25.156 |
| | Gjaldføri við ársbyrjan | 84.120 | 58.964 |
| | **Gjaldføri við ársenda** | **44.468** | **84.120** |

# VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur o.a.** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 1.409 | 1.652 |
| | Útlán | 60.596 | 58.298 |
| | Lánsbrøv | 6.798 | 9.961 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **68.803** | **69.911** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | 0 |
| | Innlán | 14.381 | 15.761 |
| | Ábyrgdarpeningur | 107 | 109 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **14.488** | **15.870** |
| 3 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | -521 | -1.276 |
| | Gjaldoyra | 50 | -6 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-471** | **-1.282** |
| 4 | **Aðrar vanligar inntøkur** | | |
| | Nettoúrslit av rakstri av fastari ogn | 366 | 372 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 306 | 160 |
| | **Aðrar vanligar inntøkur tilsamans** | **672** | **532** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a.** | | |
| | Løn og samsýning til nevnd | 420 | 420 |
| | Løn og samsýning til stjórn | 1.096 | 981 |
| | Løn og samsýning til umboðsráð | 68 | 72 |
| | Løn til starvsfólk | 9.974 | 9.703 |
| | Eftirløn | 1.797 | 1.612 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd o.a. | 818 | 722 |
| | **Starvsfólkaútreiðslur tilsamans** | **14.173** | **13.510** |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 15.661 | 15.475 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. tilsamans** | **29.834** | **28.985** |

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 5 | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk (framhald) | 33,0 | 34,1 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar** | **455** | **585** |
| | - Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 0 | 0 |
| 6 | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 207 | 207 |
| | Maskinur og innbúgv | 862 | 908 |
| | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **1.069** | **1.115** |
| 7 | **Aðrar vanligar útreiðslur** | | |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 2.871 | 432 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| | **Aðrar vanligar útreiðslur tilsamans** | **2.871** | **432** |
| 8 | **Ogn hjá peningastovnum o.ø.** | | |
| | Uttan uppsøgn | 33.213 | 79.311 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 0 | 0 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **33.213** | **79.311** |
| 9 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 11.989 | 13.507 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 29.898 | 30.940 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 97.304 | 86.624 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 347.614 | 335.056 |
| | Yvir 5 ár | 483.800 | 422.869 |
| | **Útlán tilsamans** | **970.605** | **888.997** |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar** | | |
| | Burturlagt uppá útlán og ábyrgdir við ársenda | 33.370 | 31.914 |
| | Burturlagt við ársenda uppá ogn hjá peningastovnum og aðrar postar við kredittváða | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **33.370** | **31.914** |

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 9 | Akkumuleraðar burturleggingar í % av | | |
| | bruttoútlánum við ársenda (framhald) | 3,2% | 3,2% |
| | **Ikki renturoknað áogn við ársenda** | **3.587** | **1.270** |
| 10 | **Lánsbrøv** | | |
| | Børsskrásett | 156.101 | 174.049 |
| 11 | **Partabrøv** | | |
| | Onnur | 729 | 724 |
| | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | Onnur | 15.556 | 15.596 |
| | **Fíggjarlig umsetningsogn** | | |
| | Fíggjarlig umsetningsogn ásett til marknaðarvirði | 156.101 | 174.049 |
| | Munur millum útveganarvirði av fíggjarligari umsetningsogn | | |
| | omanfyri og hægra marknaðarvirði uppgerðardagin | -701 | -234 |
| 12 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 10.821 | 9.536 |
| | Tilgongd | 0 | 1.285 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **10.821** | **10.821** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 3.491 | 3.284 |
| | Avskrivingar í árinum | 207 | 207 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 0 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **3.698** | **3.491** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **7.123** | **7.330** |
| | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Maskinur og innbúgv** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 10.752 | 9.249 |

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | Tilgongd (framhald) | 1.083 | 1.503 |
| | Frágongd | 316 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **11.519** | **10.752** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 7.586 | 6.679 |
| | Avskrivingar í árinum | 862 | 908 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 236 | 0 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **8.212** | **7.586** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **3.307** | **3.166** |
| | **Bókað virði við ársenda, ítøkiligar ognir tilsamans** | **10.430** | **10.496** |
| 13 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 4.334 | 3.541 |
| | Aðrar ognir | 314 | 67 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **4.648** | **3.608** |
| 14 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | | **0** | **0** |
| 15 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 368.005 | 285.979 |
| | Við uppsøgn | 485.001 | 568.619 |
| | Serinnlán | 79.092 | 69.665 |
| | **Innlán tilsamans** | **932.098** | **924.263** |
| | Uttan uppsøgn | 368.005 | 285.979 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 30.975 | 44.662 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 471.980 | 540.295 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 15.620 | 13.572 |
| | Yvir 5 ár | 45.518 | 39.755 |
| | **Innlán tilsamans** | **932.098** | **924.263** |

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 16 | **Burturleggingar til útreiðslur** | | |
| | Treytaleys eftirlønartilsøgn. | 2.660 | 2.713 |
| | Útsettur skattur | 68 | 219 |
| | **Burturleggingar til útreiðslur tilsamans** | **2.728** | **2.932** |
| 17 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 3.601 | 2.942 |
| | Tilgongd, netto | 3 | 659 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **3.604** | **3.601** |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 26.647 | 63.155 |
| | Kreditttilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 8.167 | 8.061 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **34.814** | **71.216** |
| 19 | **Stjórn og nevnd** | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans | | |
| | Stjórn | 1.117 | 1.212 |
| | Nevnd | 3.273 | 1.870 |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 1.090 | 1.090 |
| | Nevnd | 5.888 | 4.943 |
| 20 | **Kredittváðar – útlán býtt í vinnugreinir í %** | | |
| | Almennir myndugleikar | 1 | 1 |
| | **Vinnur** | | |
| | Fiskivinna | 10 | 13 |
| | Framleiðsluvinna o.a. | 6 | 7 |
| | Byggivinna | 3 | 2 |
| | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 6 | 5 |
| | Flutningur, postur og telefon | 2 | 2 |

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 20 | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna (framhald) | 0 | 0 |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 5 | 4 |
| | Aðrar vinnur | 1 | 2 |
| | **Vinnur tilsamans** | **33** | **35** |
| | Privat | 66 | 64 |
| | **Tilsamans** | **100** | **100** |
| 21 | **Marknaðarváðar** | | |
| | Gjaldoyraváði | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 562 | 1.075 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 252 | 702 |
| | Gjaldoyraábending | 310 | 373 |
| | Gjaldoyrábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,1 | 0,2 |
| 22 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | | |
| | – alt í DKK | 2.548 | 3.580 |
| 23 | **Skattur** | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | 4.906 | 4.365 |
| | Útsettur skattur | -151 | -32 |
| | Javnan av roknaðum skatti | -2 | 0 |
| | **Tilsamans** | **4.753** | **4.333** |
| 24 | **Millumverandi við assosieraðar fyritøkur** | | |
| | Sp/f Niels Finsensgøta 7 | 50% | 50% |
| | P/f Kósin | 25% | 25% |
| | **Innlán** | **2.002** | **1.198** |
| | **Útlán** | **31.862** | **40.305** |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri 2004 hjá Norðoya Sparikassa er gjørd í samsvari við lóg um bankar og sparikassar o.a., umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi hjá peningastovnum.

Nýtti roknskaparhátturin er tann sami, sum varð nýttur í 2003. Samanberingartølini fyri 2003 og 2004 eru uppgjørd eftir somu roknskaparkunngerð.

## Tíðaravmarkingar

Rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur o.a. eru fult út tíðaravmarkaðar, eins og allar aðrar avgerandi inntøkur og útreiðslur eru tíðaravmarkaðar.

## Kassapeningur, innlán uttan uppsøgn hjá tjóðbankum og ogn hjá peningastovnum

Hesar ognir eru tiknar við til áljóðandi virði.

## Útlán og onnur áogn

Sparikassans samlaðu ognir eru í samsvar við góðan og varnan roknskaparhátt undirgivnar eina atfinningarsama meting við atliti til avhyljing av tapsvandum, og tær neyðugu upphæddirnar eru av-settar. Staðfest tap ígjøgnum árið eru avskrivaði fult út.

## Lánsbrøv, partabrøv og kapitalpartar

Goymsla sparikassans av børsskrásettum lánsbrøvum er sett til teir almennu kursirnar við ársenda 2004.

Goymsla sparikassans av partabrøvum, ið eru óskrásett, er í mesta lagi sett til keypsvirðið.

Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum, ið eru óskrásett partabrøv, eru tiknir upp til innara roknskap-arliga virðið við ársenda 2004.

## Fastar ognir

Fastar ognir eru virðissettar til keypsvirðið við ískoyti av ábøtum og við frádrátti av avskrivingum.

Ognir, sum sparikassin hevur ognað sær til egna nýtslu, verða avskrivaðar yvir 50 ár, meðan ognir, ið sparikassin hevur yvirtikið í sambandi við uppgerð av millumverandi, og sum skulu seljast, verða avskrivaðar við støði í árligum innanhýsis metingum av ognunum.

## Maskinur og innbúgv

Maskinur og innbúgv eru sett til keypsvirðið frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður rættlinjað í tíðarskeiðinum, ognirnar kunnu hugsast vera haldgóðar.

## Fremmant gjaldoyra

Goymslan í fremmandum gjaldoyra er sett til skrásettu kursirnar við ársenda.

## Innlán og onnur skuld

Innlán og onnur skuld eru upptikin til áljóðandi virði.

## Skattur

Skattur av ársinntøkuni og broytingar í útsettum skatti er útreiðsluført.

Útgevari: Norðoya Sparikassi
2005

Myndatøka: Norðoya Sparikassi, Vasti, Per á Hædd, Norðlýsið, Eyðun Klakstein,
Finn Johannesen, Hákun Dam, Álvur Haraldsen, Blitz Foto, Símun á Høvdanum, Eyðun Nolsøe

Design og uppseting: Vasti
Prent: Estra




